gult28 cyan28 magenta28 svart28



# HEILSANIR



**Góði fitti Ottar babba**
Eg og mamma ynskja tær hjartaliga tillukku við 31 ára degnum 29. juni.
**Heilsan Martin**
**P.S. Vit elska teg**



**Góði fitti Magni**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum 30. juni
**Bestu ynskir Sólvá**



**Góði Jacob**
Hjartaliga tillukku við 1 ára føðingardegnum.
**Bestu heilsanir vit øll**



**Góða omma**
Hjartaliga tillukku við 70 ára føðingardegnum. Her ert tú cool omma, vit gleða okkum til í kvøld.
**Heilsan ommubørnini**



**Góða Eyðgerð fastir og mostur**
Hjartaliga tillukku við 25 ára starvsdegnum í morgin, takk fyri at tú altíð ert so góð við okkum.
**Jensa, Alma, Frank, Teitur og Bogi**



**Góðu foreldur**
Hjartaliga tillukku á silvurbrúdleypsdegnum 3. juli. Vónandi fáa tit ein góðan og ógloymandi. Við ynski um Guds ríku signing í framtíðini.
**Børnini**



**Hey elskaða Durita**
Takk fyri eitt super ár tann 28. juni.
**Heilsan tín Meinhard**



**Góði allarbesti abbi**
Hjartaliga tillukku við 50 ára degnum 29. juni. Eisini ein heilsan til mamba, tillukku við 16 ára degnum 30. juni. Takk fyri at tit eru so góðir við meg
**Heilsan Eyðun**



**Okkara allarbesta Helena**
Takk fyri øll árini tú hevur fjálgað, hugna og strevast her hjá okkum. - Vit fara at sakna teg, men hygg inn ofta. Alt tað besta í framtíðini, gott »otium« og gott summar.
**Ynskja vit øll á barnadeildini**



**Góða mamma**
Hjartaliga tillukku við 70 ára føðingardegnum. Takk fyri alt tú er fyri okkum.
**Bestu ynskir døturnar**



**Góða Judit**
Hjartaliga tillukku við 5 ára degnum.
**Ynskja mamma og babba**



**Vakna Ottar...**
Nú er ikki at sova, tú fyllir jú (bara) 31 ár í dag.
**Ynskja ballararnir**
**P.S. Nær byrjar ballið?**



**Góða Elin**
Hjartaliga tillukku við 14 ára degnum 1. juli. Takk fyri at tú ert so góð við okkum.
**Ynskja Kiski og Molly**



**Allarbestasta mostir**
Tillukku við 30 ára føðingardegnum. Vit gleða okkum til mánadagin, tað er sooooo gott at tú ert aftur hjá okkum.
**Heilsan Tummas og Guðrið**



**Góða systur**
Hjartaliga tillukku við tí runda føðingardegnum 2. juli.
**Ynskja Ingvør og Sigurð**



**Góða mamma**
Hjartaliga tillukku við 50 ára degnum, takk fyri alt tú hevur verið fyri okkum.
**Heilsan Árni og Sylvia**
**P.S. Hettar var bara túrurin**



**Góða Elin**
Hjartaliga tillukku við 14 ára degnum í morgin 1. juli.
**Ynskja mamma, babba, Katrin, Dóra og Pætur**



**Góða elskaða dóttir**
Hjartaliga tillukku á 30 ára føðingardegnum. Alt tað besta í framtíðini.
**Ynskja mamma og babba**



**Allarbesta Eyðgerð**
Hjartaliga tillukku við 25 ára starvsdegnum. Tú ert ófør. Alt tað besta í framtíðini, og gott summar.
**Ynskja vit øll á barnadeildini**



**Góði elskaði Magni**
Hjartaliga tillukku á 1 ára degnum 30. juni
**Ynskja omman og abbin**


## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.................................................................
...........................................................................
...........................................................................
...........................................................................
...........................................................................
...........................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ...................................................................
Bústaður: ..............................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**


gult29 cyan29 magenta29 svart29



# TILTØK

## FØÐINGAR

7. juni fingu Sanna Vitalis og Finn Mørk, búsitandi í Keypmannahavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4000 gr.

10. juni fingu Trine Norup Andersen og Poul Andreas S. Lamhauge, Sønderborg, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3670 gr.

18. juni fingu Annbritt Heinesen og Andreas Andreassen, Leirvík, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3000 gr.

19. juni fingu Lovisa og Jan Nielsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 4150 gr.

20. juni fingu Marita og Árni Joensen, Hoyri, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3100 gr.

21. juni fekk Viviann Andreasen, Hvalvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3795 gr.

22. juni fingu Rúna og Levi Sivertsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3850 gr.

23. juni fingu Bjarna Davidsen og Jan-Eivind Christiansen, Kvívík, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 3800 gr.

23. juni fingu Súsanna Magnussen og Jónleif Jensen, Hvítanes, eina dóttur. Honv ar 56 cm. long og vigaði 4100 gr.

23. juni fingu Marian og Billy Petersen, Viðareiði, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3400 gr.

24. juni fingu Anna-Lis Dam og Jens Petersen, Saltangará, eina dóttur. Hon var 52 cm. long ov igaði 3750 gr.

25. juni fingu Sóleyð Holm og Bogi Henriksen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 3900 gr.

25. juni fingu Sanna Hansen og Dennis Blaaberg, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3900 gr.

26. juni fingu Tórun Sørensen og Niels Magnussen, Øravík, eina dóttur. Hon var 53 cm. long ov vigaði 3600 gr.

26. juni fingu Annelena og Jørgen Niclasen, Sørvágur, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4150 gr.

## ANDLÁT

**20. juni**
Margretha Bendtsen, fødd Øregaard, ættað úr Leirvík búsitandi í Frederiksberg, 103 ár.
Anni Jensen, ættað úr Havn, búsitandi í Fynshav á Als, 59 ár.

**21. juni**
Anna Kathrina Højgaard, úr Rituvík, búsitandi á Glyvrum, 88 ár.
Jóan Pauli Johannesen, í Miðvági, vanliga nevndur Grete Jóan Pauli, 80 ár.

**22. juni**
Katrina Johannesen, ættað úr Elduvík, búsitandi í Miðvági, 89 ár.

**27. juni**
Ida Rasmussen, Funningsfjørður, 77 ár.
Birgit Mortensen, fødd Sivertsen, Hoyvík, 55 ár.

### Gudstænastur
***3. sunnudag e. Trinitatis***
*Havnar kirkja:* kl. 11, Bjarni Bæk
*Hvítanes:* kl. 11, Sonja Klein
*Vágur:* kl. 11, Erland Beder
*Glyvrar:* kl. 11,
*Æðuvík:* kl. 17, Jónsvein Bech
*Fuglafjørður:* kl. 11, Uni Næs
*Saksun:* kl. 11,
*Hvalvík:* kl. 12, Marjun Bæk
*Hósvík:* kl. 11, Martin R. Jacobsen
*Norðskála:* kl. 17 altarg., Peter O. K. Olofson, kirkjukaffi aftaná
*Christianskirkjan:* kl. 11, altarg., Leif Mortensen og Niels P. Danielsen
*Húsar:* kl. 11, altarg., Hans Eiler Hammer
*Klaksvíkar sjúkrahús:* kl. 10,
*Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Elsa Funding
*Mikladalur:* kl. 12, altarg., Jens Hvas
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Heri Joensen
*Sandur:* kl. 12, Jákup R. Hansen
*Hvalba:* Ólavur Rasmussen
*Fámjin:* altarg., P. M. Rasmussen
*Kollafjørður:* kl. 11, altarg., Marjun Bæk
*Kvívík:* kl. 12, Martin R. Jacobsen
*Hvalvík:* kl. 11, Inga Poulsen Dam

### Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin verður eingin sunnudagsskúli í Hoyvíkar skúla vegna summarfrí.
Kl. 17.30 bøn og kl. 18 møti við Jógvan Steintún.
Øll eru vælkomin.

### Adventkirkjan
Leygardagin kl. 10 barnabíbliutími og bíbliugransking, kl. 11 gudstænasta, Johann Thorvaldsson.
Kl. 15 brúðarvígsla.

### Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 hámessa v/Benny Blumensaat í Mariukirkjuni.

### Rhema á hálsi
Mikudagin kl. 17-18 bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30. A.T.A.P. kids.
Leygarkvøldið kl. 20 Next Generation (ungdómsmøti).
Sunnudagin kl. 11 møti og sunnudagsskúli, Fríðtór Debes talar. Øll eru vælkomin.

### Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 breyðbróting, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. møti, kl. 21 útimøti.
Mikukvøldið kl. 20 bønar- og uppbyggingarmøti.

### Meinigheitshúsið
Sunnukvøldið kl. 18 møti við Hanus Simonsen.

### Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 landsbøn, í morgin kl. 11 morgunmøti við Tummas Jacobsen, kl. 18 kvøldmøti við Tummas Jacobsen, kl. 22 útimøti við Feladelfia.
Mánakvøldið kl. 20 bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

### Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 18 evangeliskt møti.

### Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13 sunnudagsskúli, kl. 17 møti.

### Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Heimasíða okkara: www.koma.fo

### Kvívíkar kirkja
Leygarkvøldið kl. 19.30 Summartónar við tveimum violinum (Øssur Bæk og Rúni Bæk).

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygard. 30. juni: Andreas Petersen, tlf. 441086
Sunnud. 1. juli: Knud Jakobsen, tlf. 423006

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

### Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 18 samkomufundur.
Mánakvøldið kl. 20 bíbil- og bønarmøti.

### Vestmanna missiónshús
Sunnudagin kl. 18 møti við teim 4 úr Havn.

### Útimøti
Heimamissiónin hevur útimøti í Kaldbak leygardagin kl. 20.30 við sangbólkinum Gittit o.ø.

### Filadelfia, Sundalagið
Í annaðkvøld kl. 18 kvøldmøti við Rúna Rasmussen.
Miðdepilin og Urtagarðurin halda summarfrí til ávíkavist tann 22. og 23. august.

### Keldan, Skálafirði
Hóskvøldið opið hús kl. 20 við Paula Høj.
Sunnukvøldið kl. 19 møti við húsbólkinum hjá Alice og Jónhard. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

### Skála meinigheitshús
Í kvøld skipar thabor í Fuglafirði fyri ungdómsmøti kl. 22 og »opið hús« seinni, í samband við Varmakelduna. Bilar koyra frá meinigheitshúsinum kl. 21.20. Á møtinum sunnukvøldið kl. 19 luttaka Magni Christiansen og Jákup Fonsdal við sangi og vitnisburði, tey ungu luttaka eisini við lovsangi. Aftaná verður drekka og hugnalig samvera.

### Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum
Sunnudagin kl. 19 møti við Niels J. Nielsen trúboðara. Drekka og innsavnan. Húsakórið syngur. Sangarar møta kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Thabor, Fuglafjørður
Ungdómsmøti verður á Varmakeldu leygarkvøldið kl. 22. Reimund Langgaard talar. Aftaná møti er opið hús við sangi og vitnisburði. Millum annað luttaka G-sus og Christian Joensen við sangi. Suppa og drekka verður at fáa. Sunnudagin er møti kl. 18 Margeir Toftegaard talar.

### Lívsins Orð
Seminar um opinberingina verður í dag kl. 9-14.30 við Ed Brancamp, trúboðara úr Letlandi.
Sunnudagin kl. 10.30 verður møti við Ed Brancamp.

### Soli Deo Gloria
Mikumorgunin kl. 06 bøn.
Leygarmorgunin kl. 09 bøn saman við Getsemane.
Sunnudagin kl. 18 møti.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

### Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnukvøldið kl. 18 møti við Albert og Kammu. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkmin.

### Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 18 evangel. fundur, kl. 21 útifundur um viðrar.
Ónsdagin kl. 20 bønar- og uppbyggingarfundur.

### Missiónshúsið í Vági
Sunnukvøldið kl. 18 møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 13-15.00 á tlf. 212380.

### Tilhaldið í Tórsgøtu 21
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 2. juli:*
kl. 10-16 Fyrireiking til ólavsøku.
kl. 19 Kvøldseta (vitjan úr Danmark). Skildringer fra en barndom i Finnmark, Thorbjørn Berg, felagssangur. Listamaðurin Sigmundur Petersen – Vígdis Sigmundardóttir sigur frá.
**Frá 3. juli til 17. august er Tilhaldið opið mánadag-fríggjadag kl.1 4.00-18.00.**
Á ólavsøku 27., 28. og 29. juli kl. 14.00-18.00 verður framsýning av listaverkum hjá Fridtjoffi Joesnen á 1. hædd og í kjallaranum verður framsýning av úrvali av klæðum frá SIRRI. (Suðuroyar Ullvirki)

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

### AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Leygarmorgunin kl. 9-10 roykfríur fundur.
Fundir verða leygardagin kl. 17.00-18.00, sunnudagin kl. 11.00-12.00 og mánakvøldið kl. 20.00-21.00.

### AA-kvinnufundur
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Opin AA-kvinnu fundur í Havn sunnukvøldið kl. 20.

### VBA
Reinsaríið, Tórsgøta 5: (Vaksin børn hjá alkoholikarum) ella ørkymlandi familjuumstøður. Opin fundur sunnudag kl. 17.